almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

**Umsóknir**
Sendið umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn.

**Umsóknarfreistin**
Freistin at søkja er týsdagin 26. juni 2007 kl. 12.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Á Almannastovuni arbeiða umleið 100 fólk, harav 7 starvast á økisdeildini í Saltangará.

# Almannastovan søkir SOSIALRÁÐGEVAR TIL ØKISDEILDINA Í EYSTUROY

Á Økisdeildini í Saltangará, Heiðavegur, eru 2 størv leys til setan skjótast tilber.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er**
- at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa áheitanum til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

**Tær sosialu fyriskipanirnar, ið deildin serliga tekur sær av, eru**
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, herundir uppihaldshjálp og stuðul til heilivág og smærri hjálpartól
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í sambandi við umsóknir um fyritíðarpensiónir

**Førleikakrøv**
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni
- evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfaklig

**Vit kunnu bjóða**
Eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Egil G. Olsen, deildarleiðara, tel. 47 47 10.

KREA.FO · TEL 4780 00

TEYMAR GÁVAN LEIKA

# Teymavirkið og Berglon søkja eftir fólki

## Maskinsmiður

Teymavirkið P/f í Runavík sóknast eftir maskinsmiði at byrja mánadagin 02.07.2007 ella skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi. Arbeiðið umfatar ymiskt smiðuarbeið umframt annað framleiðslu- og goymsluarbeiði. Løn sambært avtalu.

Vit vænta, at tú ert útbúgvin maskinsmiður ella hevur arbeiðsroyndir innan økið, at tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt og tekur ábyrgd. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men tó avbjóðandi. Roknast kann við yvirtíðararbeiði ávís tíðaskeið.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Berglon, Boks 210, 620 Runavík, í hendi seinasta lagi hósdagin 21.juni 2007.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Rúna Berg á beinleiðis tlf. 773 012.

## Skrivstovulærlingur

Berglon P/f í Runavík sóknast eftir skrivstovulærlingi at byrja 02.07.2007 ella skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi. Í lærutíðini kemur tú at gera alt vanligt skrivstovuarbeiði. Vit arbeiða við nútímas telduforritum og kunnu sostatt bjóða eina tíðarhóskandi skrivstovuútbúgving.

Vit vænta, at tú hevur FHS,- HH-prógv ella líknandi, at tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men tó avbjóðandi.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Berglon, Boks 210, 620 Runavík, í hendi seinasta lagi hósdagin 21.juni 2007.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Ingolf Petersen á beinleiðis tlf. 773 014.

## Handilslærlingur

Berglon P/f í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja 02.07.2007 ella skjótast møguligt.

Vit bjóða eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi. Í lærutíðini kemur tú, upp á skift, at starvast í Teymum, Leiku og Gávuni. Skúlagongdin er í Danmark.

Vit vænta, at tú hevur FHS- ella HH-prógv, at tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men tó avbjóðandi.

Umsókn við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Berglon, Boks 210, 620 Runavík, í hendi seinasta lagi hósdagin 21.juni 2007.

Meiri fæst at vita við at venda sær til Maluna Nielsen á beinleiðis tlf. 773 021.

BERGLON

REPROZ